## Danir gjalda meiri

Donsk reiðarí sum A.P. Møller-Mærsk, Torm og Norden hava ikki so góðar umstøður sum teirra kappingarneytar í øðrum evropeiskum londum. Altjóða grannskoðarafelagið Pricewaterhouse Coopersww vísir í einari frágreiðing á, at donsk reiðarí rinda skatt av vinninginum, tá tey selja skip, og tað gera onnur evropeisk reiðarí ikki. Sambært frágreiðingini er Danmark einasta landið í Evropa, sum krevur skatt av kapitalvinninginum.

## Magnus formaður

Á aðalfundi í Klaksvíkar Handilsfelag herfyri fekk felagið nýggja nevnd, og nýggjur formaður er Magnus Arge. Hann sigur við Norðlýsið, at handlarnir í Klaksvík selja meiri nú, enn teir gjørdu, áðrenn Norðotarunnilin kom. Serliga nógv er at gera í handlunum, tá tað hevur verið ókeypis at koyra ígjøgnum tunnilin. Magnus Arge vónar tí, at leiðslan í tunnilsfelagnum fer at endurskoða prísásetingina, nú tunnilin verður eitt ár í næsta mánað.

Clinton og Blix- tiltakið:

# Atgongumerkini seld eftir sløkum tjúgu minuttum



**– Bert tríggir persónar sleppa ókeypis til ráðstevnuna. Sum fyrireikarar hava vit bjóðað løgmanni, løgtingsformanninum og borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu ókeypis luttøku, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað stóð ikki á hjá Vinnuhúsinum í morgun at selja tey 120 atgongumerkini til ráðstevnuna, sum verður í Norðurlandahúsinum 24. mai við fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton og vápnaeftirlitsmanninum, Hans Blix.

Sosialurin var inni á gólvinum í Vinnuhúsinum, tá ið sølan byrjaði. Sølan fór fram um telefonina, og tað vóru fýra fólk, sum sótu og tóku ímóti bíleggingum.

Tey, sum tóku telefonina, vóru Marita Rasmussen, Belinda Lilá, Ester Dahl og Mikkjal Joensen, og tey høvdu úr at gera.

### Stórur áhugi

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, segði seg rokna við, áðrenn sølan byrjaði, at atgongumerkini fóru at ganga sum »heitt breyð«, og tað gjørdu tey eisini.

Eftir sløkum 20 minuttum vórðu tey 120 atgongumerkini, sum almenningurin hevði høvi at keypa, seld, og soleiðis keyptu føroyingar fyri 600.000 krónur í atgongumerkjum eftir lítlari løtu.

– Hetta er eitt serstakt tiltak við serstøkum persónum, og tá ið fólk kunnu fara til Bretlands at hyggja at fótbólti, trúgvi eg eisini, at hesi 120 atgongumerkini fara at ganga sum »heitt breið«, segði Jan Mortensen stutt eftir, at sølan var byrjað.

Spurdur, hvør tað er, sum hevur keypt sær pláss til ráðstevnuna, sigur hann, at talan er um ymisk fólk – heilt frá politikarum, læknum til vanligar einstaklingar.

– Vit upplýsa ikki nøvn á teimum, sum hava bílagt atgongumerki, men eg kenn-ist við nøkur teirra, og út frá hesum kann eg siga, at tað eru fólk úr ymiskum heraðshornum í samfelagnum.

### Limirnir fyrst

Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum skipar fyri tiltakinum við Clinton og Blix, hevur 530 limafeløg og hesi hava øll fingið bjóðað atgongumerki til keyps.

– Flestu av hesum feløgum hava havt høvi at keypa eitt atgongumerki, og tey størstu feløgini hava havt høvi at keypt fimm.

Støddin á feløgunum verður roknað eftir limagjaldinum til Føroya Arbeiðsgevarafelag, og limagjaldið til FAG sigur nakað um, hvussu stór feløgini eru.

Jan sigur, at eingin trupulleiki hevur verið at selt atgongumerkini til limafeløgini.

Spurdur, hvussu nógvir persónar sleppa ókeypis til ráðstevnuna, sigur hann, at talan bert er um tríggjar.

– Sum fyrireikarar hava vit bjóðað løgmanni, Jóannes Ejdesgaard, løgtingsformanninum, Edmundi Joensen og borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu, Heðini Mortensen, ókeypis luttøku.

### Á Hotel Føroyum

Jan Mortensen sigur, at bæði Clinton og Blix hava hvør sína suitu á Hotel Føroyum, men Clinton kemur og fer avstað aftur sama dag, sum ráðstevnan verður – um einki annað verður aktuelt. Hinvegin steðgar Blix ætlandi nakrar dagar í Føroyum.

Spurdur, hvørjum flogfari Cinton kemur higar til lands við, sigur hann, at tað veit hann ikki at siga, tí tað er ikki teirra borð í hesum tiltaki.

– Clinton kemur til Noregs at halda fyrilestur í flogfari, sum eg vænti, at amerikanski staturin eigur. Úr Noregi flýgur hann til Íslands í hesum flogfari, og haðani kemur hann til Føroya, meðan amerikanska flogfarið stendur í Íslandi.

### Floglíkindi?

Spurdur, hvussu verður við tiltakinum og atgongumerkjunum, sum fólk gjalda fyri, um tað ringasta skuldi hent, og floglíkindi ikki eru í Føroyum 24. mai, sigur stjórin í Vinnuhúsinum:

– Nú er hetta besta tíð av



*– Vit hugsa sjálvandi um møguleikan, at floglíkindini kunnu tarna tiltakinum. Hetta er nakað, vit einki kunnu gera við, og tí loysir tað seg heldur ikki at brúka nógva tíð upp á tað, sigur Jan Mortensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*